*Framhald av síðu 13*

blivin klárur yvir, at Heðin Brú er meira enn eitt upplop, og roynir at káva útyvir sítt mistak, men hann er framvegis tendentiøsur og fyri at lofta sær, hevur hann næstan mikroskop frammi fyri at leita eftir onkrum breki.

Hetta fær aftur Rikard Long til at reagera. Hann skrivar eitt lítið ”ummæli” av *ummæli* Christians, har hann varisliga setir tann pedantiska doktaran uppá pláss. Matras sendir sama ár út eina bókmentasøgu, har hann er sjáldsama grunnur um nógvar av sínum samtídarmonnum. Nakað seismiskt talent var doktarin avgjørt ikki. Viðvíkjandi Hedin Brú sat C.M. sjóvarfallið av sær hvørja ferð.

Men aftaná kríggið er næstan einki mark fyri, hvussu hann skammrósar sama Heðini Brú. Hesari eftirrationalisering høvdu skaldið og vinmenn bert akslaypp yvirfyri.

## Týdingar og stuttsøgur

Um hetta sama mundið og eisini nøkur ár fyri roynir Heðin Brú seg sum stuttsøgusmið, eitt nú við søgunum *Finni*, *Sigrið sodnkonu*, o.s.fr. Og sum flestøll vita, verður hann á tí økinum eftirhondini so beinrakin eygleiðari, at hann er ájavnt vid Guy de Maupassant, helst óbeinleiðis og við Thomas Mann kanska beinleiðis. Hann hevur sjálvur lisið nógv, og letur seg sjálvandi inspirera av europeiskum fyrimyndum. At hann er ávirkaður av Mann hevur hann næstan sjálvur sagt, tí tá ið pápi mín og hann skiftu orð um bókmentir, var Mann næstan altíð á lofti.

Ein av yndisbókum teirra var *Húsið Buddenbrooks*, og tað virkaði næstan, sum um Hans Jákup hevði ætlanir um at skriva eina bók um eina føroyska handilsætt. Hon, sum nógv annað tilætlað, kom tíverri ongantíð. Tey seinnu árini debatteraðu teir ofta bókina *Felix Krull*, so Mann var maður, sum Hans Jákup helt nógv av. Annars var Thomas Mann tiltikin fyri stuttsøgukompositión og sum hvassur eygleiðari.

Longu miðskeiðis í tretivunum kemur ein tann fyrsta *týðingin* hjá Hansi Jákupi. Hon er *Bigum træbein* eftir júst M. A. Nexø. Hetta er valla heldur av tilvild, tí tað hjartaligu samkenslu, sum Nexø hevdi við teimum minstu í samfelagnum, ja, hana hevdi Hans Jákup eisini. Hetta er ikki av størstu stuttsøgunum hjá Martini, men hon er grotesk, stuttlig og rættiliga socialrealistisk. Her er forstáilsi og samhugur við smáfólki, brekaðum og breyðleysum. Nexø skrivar um tey, sum eru *løgin* ella *egin* og um tann ”skeiva” eksistensin við kærleika og innlivilsi.

## Úti undir vaðingini

Tað er eyðsæð, at Heðin Brú visti, at hesa lítlu týðing fóru føroyingar at forstanda, - hon segði teimum nakað - tí hon kom í tí tíðini, tá ið vit *enn* eksporteraðu bæði brekaði, sinnissjúk og lamin niður til Danmarkar. Hesi menniskju lupu nógvir av teimum chauvinistisku sjálvsstýrismonnunum um, táið teir brølaðu um landið, teir varnaðust tey ikki, tað var ikki pláss fyri teimum! Men soleiðis sum Nexø setti samfelagsins júst allarminstu ein minnisvarða, soleiðis gjørdi Hans Jákup tað eisini! Her hevði Hans Jákup eisini ein føroyskan undanmann, socialrealistin og oyggjafelagan, M.A. Winther, sum eisini hættaði sær út í samfelagsins skýmaskot.

Sum veruligur stuttsøgumeistari vísir Hans Jákup seg fyrst við savninum *Fjallaskuggin* í 1936. Her eru fagrar og tankavekjandi lýriskar náttúrulýsingar. Men hann fer aftur heilt út undir vaðingina í samfelagnum og skrivar um tey marginaliseraðu, tey anonymu. Summar av søgunum vóru skrivaðar fyrr, men nú er tað týðuligt, at hann hevur lært skrivihandverkið væl og virðiliga, sjálvt um hann verður enn meira fulltikin seinni.

Hann er næstan brutalur eygleiðari av fólki, men ger tað kortini við alski og virðing. Hann fær so ótrúliga nógv meira við, enn vanlig fólk vildu fingið, og hann smoyggir eisini socialrealistiska hamin heilt av sær viðhvørt, so vit fáa varhugan av bæði littererari impressionismu og symbolismu. Hetta er eitt kynstur, sum hann dyrkar heilt út í æsir aftaná kríggið. Tað síggja vit t.d. í eftirkríggssøvnunum, *Flókatrølli*, *Purkhúsi* og *Búravninum*. Stuttsøgur hansara gerast har uppaftur betri, men longu í Fjallaskugganum er hann av mætastu *essayistum*.

## ”Hetjur” herja á Heðin

Annars hevði Heðin Brú nøkur ár eftir, at hann varð settur í starv á Føroya Jardarráði eitt groteskt upplivilsi, sum fekk bæði littereran og politiskan týdning. Hetta var í sambandi við, at bóndafeðgarnir Patursson, *Jóannes og Páll* saman við *Líggjasi úr Gøtu* og øðrum ráðaríkum moldhøvdingum komu siglandi sum flokksmenn á albrynjaðari bóndaskútu til Klakksvíkar og hóttaðu við at leggja hond á teir báðar embætismenninar Hans Jákup frá Jardarráðnum og Norðoyar sýslumann, Hákun Hansen.

Tað segðist, at fleiri klakksvíkingar tóktu synd í sjálvsstýrishetjunum, táið tær líkbleikar krupu í land av fullveldisskútuni, tí hetjurnar vóru heldur enn ikki ússaligar, - sjómansskapurin lítil og moralurin syndarligur innanborða. Tann stolti bóndaknørrurin hevði valla sloppið gjøgnum nakað skipasýni. Summir av teimum *allarmætastu* bøndrunum vóru næstan deyðir av sjóverki.

***Men_.*** hetta vóru raskir menn, so teir ernaðust skjótt aftur og fóru næstan beinanvegin braneggjaðir rópandi og herjandi niðan gjøgnum brekkuna á Biskupsstøð at reka sakleys starvsfólk burtur úr sínum lógliga arbeiði. Tað styrkti moralin hjá hesum djørvu búnaðar-gørpum, at teir fingu lokalar bøndur at fylkjast vid sær; - teir skuldu jú basa tveimum monnum.

Nú skuldi embætisvaldið takast við hørðum! At ein heil bátsmanning av maktsjúkum chauvinistum kundi reka tveir óvápnaðar menn av bønum við nevarætti, ja, tað hildu *summi* vera eina djarva og mannsliga gerð, men allarflestu føroyingar vamlaðust vid hendingina.

Dagin eftir lat politimeistarin kongsbóndahetjurnar vita, at um ikki Heðin Brú og sýslumaðurin fingu arbeidsfrið, so vildi alt *agrarliðið* verða handtikið og fastsett. Tá ræddust tær reystu bóndakempurnar og bakkaðu. Seinni á degi sóust summar teirra fara so nakkalangar aftur av bygdini, meðan aðrar hetjur sluppu at ugga seg inni hjá Hanusi av Biskupsstøð, kongsbónda.

Hví vóru hesar *junkaratypur* so ógvisligar, at tær vildu gera seg inn á lógligt fungerandi embætismenn? Jú, tí Heðin Brú og Hákun sýslumaður heilt í tráð vid hina viðgitnu og sera socialthugsaðu *Gráu bók* vágaðu sær at stykkja út til fátækar traðarmenn av kongsjørðini í Klakksvík. Hetta kallaðu bøndurnir kúging og harraboð! Teir ráðaríku kongsbøndurnir untu ikki vanliga fólkinum jørð!

## Gráa bók verður til Gráa tátt

Hans Jákup gjørdist ikki sørt skakkur av hesi grovu hending, og hann refereraði ofta sarkastiskt til henda barokka tilburðin vid orðunum: *”Ja, tað var ta ferðina, tá ið sjálvsstýrishetjurnar vildu drepa meg harnorðuri!”*, - men kortini lat hann seg hvørki knekta ella kúga — hann yrkti ein stuttligan tátt móti teimum hysterisku kongsbøndrunum, - eina spotska *heroidu*, sum altíð fer at vera ein perla í føroyskum bókmentum, men *heilt* goymd burtur av fullveldisliðinum. Undarligt, at so týðandi partur av lívsverki og -søgu skaldsins skal dyljast sum mansmorð!

Tað er ikki góður tóni longur at kvøða *Gráa tátt*. Hann er úti fyri skipaðum og miðvísum *censuri*. Tey í **kulturmafiunni**, sum eru so fræg, at tey vita um *Gráa*, gera alt, tey eru ment fyri at krógva og tiga hann burtur. Stóð tað til litterert ansið og vakið fólk, ja, so var *Grái* fast studenta- og lærararaskúlapensum, tí hann hevur bæði søguligan- og littereran relevans. *Grái* átti at verið fast *repertoire* hjá einumhvørjum dansifelagi.

Tátturin var sum so nógv tilfar hjá Hansi Jákupi fyrstu ferð settur á prent í Sosialinum heystið 1938. Hann fekst eisini sum serprent. Men undir krígnum var av loysingarmonnum gjørt nógv fyri at beina fyri hesum kompromitterande riti.

*Framhald*


# Lærlingur
## til handilin í Havn

Uppgávan hjá Rúsdrekkasølu Landsins er at innflyta og selja rúsdrekka í Føroyum.
Stovnurin eigur í so stóran mun sum gjørligt at verða rikin út frá handilsligum sjónarmiðum, tó við neyðugum atliti til heilsuligu sjónarmiðini, sum eru ásett í endamálsgreinini í rúsdrekkalógini.

Rúsdrekkasøla Landsins hevur sølubúð á Drelnesi, í Skálavík, Miðvági, Havn, Saltangará og í Klaksvík umframt postordrasølu. Harafturat er rúsdrekkasølan vøruútvegari til matstovur o.o. við skeinkiloyvi og til tollfría marknaðin.

**Um starvið:**
Læran umfatar allar tættir í rakstri av einum nútímans handli við denti á vørukunnleika og kundatænastu.

Lærutíðin er 2 ár og 18 vikur fyri umsøkjarar við HF og studentsprógvi. Handilsfakini skulu takast fyrsta árið á dag- og kvøldskúla. Hevur umsøkjarin HH er lærutíðin 2 ár, og 3 ár um umsøkjarin hevur FHS. Ástøðiligi parturin í sambandi við vørukunnleika er á skúla í Danmark í samanlagt 8 vikur.

Lønin er sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

**Um lærlingin:**
Lærlingurin skal hava hug til at nema sær kunnleika innan økið, ið rúsdrekkasølan virkar á, vera fyrikomandi, álitandi og hava góð samstarvsevni.

Tey, ið søkja starvið, skulu hava FHS, HH, HF ella studentsprógv.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Dagmar S. Joensen

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 27. september.

**Rúsdrekkasøla Landsins**
**Hoyviksvegur 51**
**Tórshavn**
**Tel 31 42 77**

*Rúsdrekkasøla Landsins*
Hoyvíksvegur 51 · Postboks 3060 · FO-110 Tórshavn
Tel (+298) 31 42 77 · Fax (+298) 31 22 60


# Bilar

Nr. 181 • hósdagur • 20. september 2001 • 75. árg.



*Polo við 5 hurðum hevur nú fingið ein síðurút afturat*

# VW Polo
# – kemur nú í fjórðu generatión



*Nýggi Polo verður 15 cm longri enn forgangarin, og harvið verður betri pláss til tey ferðandi á baksetrinum.*

**VW Polo, sum er ein sera væl umtóktur bilur, kemur nú í fjórðu generation, ið er vorðin væl størri og rúmligari enn forgangarin**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Polo verður nú 15 cm longri enn forgangarin, við fimm cm størri aksulfrástøðu. Hetta gevur betri pláss til tey ferðandi á baksetrinum. Karossaríið verður eins og áður heilgalvaniserað. Polo fær ein heilt nýggjan 3 syl. 1.2 litur 65 hk bensinmotor. Fyrst í komandi ári koma fleiri nýggir motorar, t.d. ein bensinmotorur við beinleiðis innspræning (FSI) við 85 hk, og ein annar 3 syl. við 55 hk.

*Kelda: FDM / Motor*

# Ford Fiesta 2001
# – er á bilaframsýningini í Frankfurt

*Linjurnar á nýggja Ford Fiesta minna bæði um Focus og Mondeo. Bilurin kemur at seta nýggjan standard fyri plássi og útgerð í sínum klassa*





*Nú fær Fiesta eisini høgt monteraðar baklyktir, eins og á Ford Focus*

**Síðan Ford Fiesta fyrstu ferð kom á marknaðin, eru umleið 10 milliónir bilar gjørdir, og Fiesta hevur í nógvum londum verið tann mest seldi bilurin fleiri ár á rað. Nú verður ein nýggjur Fiesta er at síggja á Frankfurt Motorshow í døgunum frá 13. til 23. september**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Linjurnar á nýggja Fiesta minna bæði um Focus og Mondeo. Í 1984 var Fiesta fyrsti bilur í sínum klassa við dieselmotori, eisini var hann fyrstur við ABS bremsum í hesi støddini, eins og við airbag sum standardútgerð. Ætlanin er at nýggi Fiesta eisini skal seta nýggja standard fyri plássi og útgerð, við til dømis 6 airbag og ESP elektroniskari stabilitetsskipan sum standard. Samstundis skal framleiðslutíðin skerjast frá 22 til 16.5 tímar pr. bil.

*Kelda: FDM / Motor*

## FDM tekur í egnan barm

Eftir at BilMagasinet almannakunngjørdi, at teir høvdu havt ein Citroën Xantia, sum hevði koyrt 200.000 km inni á fýra FDM testsentrum, og teir ikki funnu øll brekini við bilinum, eru FDM farnir nágreiniliga til verka, við at útbúgva fólkið og hækka kvalitetin munandi

*Kelda: Tíðindaskriv frá FDM*

## Nýggir Ford T



Í sambandi við at Ford Motor Co. verður 100 ár í 2003, verða 6 Ford T bygdir eftir originalu tekningunum. Tá hátíðarhaldið er liðugt, verða teir settir á kenda Ford savnið í Dearborn, tætt við Detroit. Ford T vórðu gjørdir í 15 mill. eindum frá 1908 - 1927

*Kelda FDM / Motor*

## Ford og Falck



Ford í Danmark hava gjørt eina avtalu við Falck, har teir taka sær av at fáa Ford bilarnar á eitt góðkent verkstað, um teir koma út fyri at fáa ein skaða. Ford eigarin skal einans upplýsa sítt Falck abonnementnummar. Skipanin er tó ikki galdandi fyri mekanisk brek

*Kelda: MotorMagasinet*